



Frelsunarherurin í Vági tók nýggju og stásiligu húsini í nýtslu fríggjakvøldið

# Frelsunarherurin tikið nýggj hús í nýtslu

**Fríggjakvøldið var rættur hátíðardámur í Vági. Frelsunarherurin tók nýggju og stásiligu húsini í nýtslu. Við horntónleiki fór skrúðgonga úr gomlu húsunum til nýggju húsini, har eini 270 fólk vóru savnað til víglsuna av nýggju húsunum**

FRELSUNARHERURIN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Frelsunarherurin tók fríggjakvøldið í nýtslu nýggju húsini í Vági. Frelsunarherurin heldur til í Havn og í Vági. Ymsar hava umstøðurnar verið tey mongu árini, hildið hevur verið til í Vági. Og hóast húsini, sum Frelsunarherurin seinnu árini hevur átt í Vági, ikki hava verið av leið, so hóskaðu tey ikki til tíðina og ynskiligt var eisini við meira plássi.

Og nú er bøtt um umstøðurnar.

## Stásilig hús

Við hjálp frá Frelsunarherinum í Noreg kom í lag at byggja nýggj hús. Og í dag standa húsini liðug og kosta tey millum 3,5 og 4 milliónir krónur, tá alt er við. Húsini eru í tveimum hæddum og umframt er íbúð til forstandaraparið. Íbúðin er ikki full hædd. Húsini eru 21 metrar lang og 14 breið. Íbúðin er 9x14 metrar. Miðhæddin er til virksemi av ymsum slag við sali og øðrum. Kjallarin er stórur og er enn ikki innrættaður.

Fríggjaskvøldið var nógv fólk savnað til vígsluna og til at taka húsini í nýtslu. Úr Havnini komu nógv fólk og tað sigst, at ikki allir bilarnir sluppu við Smyrli hetta kvøld. Eini 270 fólk vóru komin saman til hátíðarløtuna.

Styrkt við hornblásarum úr Havn byrjaði kvøldið klokkan 19 við, at skrúðgonga við tónleiki fór frá gomlu húsunum til tey nýggju, eftir stutta takkarløtu fyri tey árini, ið hildið hevur verið til har.

Sangløta var síðani í nýggju hølunum. Klokkan 20 var sjálv vígslan og formliga vóru húsini tikin í nýtslu. Sámal Jákup Joensen leiddi sangløtuna.

Hans Jørn Mølkjær, ið er verkfrøðingur og hevur staðið fyri bygging hjá Frelsunarherinum, handaði so lyklarnar. Hann handaði Donald B. Ødegaard lyklarnar. Hesin er kommandørur fyri Frelsunarherin í Noreg, Íslandi og Føroyum og stóð hann eisini fyri sjálvari vígsluni.

Tá hann hevði fingið lyklarnar handaðar, handaði hann lyklarnar víðari til forstandaraparið í Vági, Eyðun og Irena Christiansen.

Hans Jørn Mølkjær greiddi í stuttum frá byggiætlanini. Hann frøddist um vælvildina og góða samstarvið við t.d. kommununa, sum eittnúi hevur staðið fyri arbeiðinum rundan um húsini.

Fólk frá ymsu samkomunum í Vági tóku lut í hátíðarløtuni og høvdu eisini orðið.

Gávur vórðu handaðar Frelsunarherinum í sambandi við at nýggju húsini eru tikin í nýtslu, bæði peningur og útgerð og kann nevnast gáva frá Vágs Kommuni og útgerð frá Formula.fo.

Seinni var drekkamunnur á skránni.

Leygardagin var løta fyri innbodnum og eini 100 fólk vóru til staðar. Sunnudagin var møti á morgni og hendan dag vóru eisini 3 soldátar innvígdir og eisini var barnavælsignilsi. Eitt hátíðarmerkt vikuskifti fór afturum og Frelsunarherurin í Vági hevur nú góðar og stásiligar karmar at virka undir mitt í Vágsbygd.





*Hans Jørn Mølkjær, ið er verkfrøðingur og hevur staðið fyri bygging hjá Frelsunarherinum, handaði so lyklarnar. Hann handaði Donald B. Ødegaard lyklarnar. Hesin er kommandørur fyri Frelsunarherin í Noreg, Íslandi og Føroyum og stóð hann eisini fyri sjálvari vígsluni.*



*Eingrím Hom í Hvalba*



# Fiskurin er rak og prísirnir eru lágir

**– Hetta er tann tíðin, tá ið fiskurin plagar at vera rak, men eg haldi, at hann er verri fyri, enn hann plagar. Sjálvt hýsan, sum plagar at vera í hampiliga góðum standi, er rak. Úrtøkan úr fiskinum er tí sum heild lítil, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Partrolararnir, Safir og Smaragd, landaðu í Saltangará í gjár. Í dag landa Jaspis og Ametyst*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Mánamorgunin landaðu partrolararnir, Safir og Smaragd, eini 170.000-180.000 pund á Fiskavirking í Saltangará. Av veiðini var 110.000-120.000 pund upsi. Restin var hýsa, longa og toskur.

Í dag landa Jaspis og Ametyst í Saltangará, men tá ið vit frættu í gjár, var ikki greitt, hvussu nógv skipini hava inni.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at minni er komið uppá land av fiski seinastu tíðina, enn vanligt hevur verið seinastu árini.

– Í síðstu viku arbeiddu vit bert mánadagin og hálvan fríggjadagin. Men hesa vikuna sær betur út, nú tvey skip longu hava landað, og tvey eru á veg. Hetta gevur arbeiði á virkinum til einar fýra dagar, sigur hann.

Virkisleiðarin vísir á, at nú upsaprísurin er so lágur, royna trolararnir at fáa onnur fiskasløg eisini, og tað minkar um nøgdina av upsa.

## Fiskurin rak

Jason sigur, at upsin er ógvuliga smáur, og sum heild er fiskurin – og ikki bara upsin – rak.

– Hetta er tann tíðin, tá ið fiskurin plagar at vera rak, men eg haldi, at hann er verri fyri nú, enn hann plagar. Sjálvt hýsan, sum plagar at vera í hampiliga góðum standi, er rak. Úrtøkan úr fiskinum er tí sum heild lítil.

Fiskavirking í Saltangará keypir bara upsan frá trolarunum. Hin fiskin, sum skipini hava, keypa onnur virkir.

## Lágur prísur

Virkisleiðarin vísir á, at upsaprísurin er framvegis líka lágur, og miðalprísurin á upsa liggur neyvan omanfyri 3,25 kr. fyri kilo – um hann yvirhøvur er so frægur, tá ið saman um kemur.

Sum skilst, er ein orsøkin til lága upsaprísin, at fiskurin er so smáur. Tann størri fiskurin, sum lítið og einki er til av, hevur ein betri prís, men tá ið hesin fiskurin ikki er uppi í veiðini, nyttar lítið.

## Minni fiskur

Jason Johannesen sigur, at minni fiskur er komin uppá land í vár enn vanligt seinnu árini.

– Orsøkin er helst hon, at trolararnir eisini royna at fáa onnur fiskasløg, soleiðis at miðalprísurin fyri lastina kvinkar eitt sindur uppeftir, sigur hann.




